# ítróttur

Nr. 46 • týsdagur • 8. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


Harald Bjørgvin, gullvinnari:

# - Vit standa saman sum eitt lið



**Ein av veteranunum hjá VÍF, Harald Bjørgvin, heldur, at ein tann størsti styrkurin hjá nýklaktu føroyameistarunum er, at teir standa saman sum eitt lið**


GULLPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Harald Bjørgvin sigur, at tað hevur ofta verið so í VÍF, at bakkarnir hava skotið kanska eini tíggju mál í part, men nú vóru bakkarnir burtur, og so var neyðugt hjá teimum at standa saman sum eitt lið, og tað var hetta, ið bar VÍF fram til meistaraheitið.

### Kapping um plássini

Harald Bjørgvin sigur, at tað hevur verið hørð kapping um plássini í VÍF, og tað hevur givið úrslit.

- Vit byrjaðu tíðliga at fáa skaðar, og teir menninir, sum traðkaðu til, hava ikki staðið nakað aftan fyri hinar, so tað sást ikki aftur á liðnum Tá ið so hinir komu aftur í aftur, hava vit havt stóra breidd, og heildin hevur verið rættuliga kompakt, og kappingin um plássini hevur gjørt allar mans betur, sigur Harald Bjørgvin.

- Vit hava havt ein breiðan hóp, og vit hava havt øgiliga góða venjing, og tað hevur borið okkum fram. Vit hava vant nógv í ár, og sum heild hevur uppmøtingin verið sera góð, sigur veteranurin.

- Vit hava eisini verið ógvuliga stabilir í dystum. Vit hava í veruleikanum bert hava eina ordiliga down-periodu, og tað var í einum dysti, har vit ikki høvdu ráð til tað, nevnliga í steypafinaluni, sigur Harald Bjørgvin.

Sjálvur minnist Harald Bjørgvin ikki, hvussu nógv meistaraheiti hann nú hevur vunnið við VÍF, men spurdur um hetta er tað seinasta sigur hann:

- Tað veit eg ikki enn. Triðja barnið er á veg, og hondbólturin krevur nógva tíð. Hinvegin haldi eg, at eg dugi rættuliga væl at verða hjá familjuni, tá ið eg kann. Eg havi tó ikki tikið nakra avgerð enn um komandi ár, sigur Harald Bjørgvin at enda.

KÍF-VÍF 19-28(8-15)

# Gullið er tryggjað



**Við einum tí besta avrikinum leingi tryggjaðu vestmenningar sær leygardagin føroyameistaraheitið í manshondbólti, tá ið teir góvu kollfirðingum eina uppvísing í meistaraspæli**


FØROYAMEISTARAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Vestmenningar hava leingi gingið og bíða eftir tí degi, tá ið teir endaliga tryggjaðu sær føroyameistaraheitið í manshondbólti 2005. Undan dystinum móti KÍF í Hoyvík leygardagin var greitt, at fekk VÍF bert tað eina stigið, so var meistaraheitið í hús.

### Púra klárir til uppgávuna

Tað var sjón fyri søgn frá fyrsta bríksli, at vestmenningarnir vóru púra klárir til uppgávuna. Allir mans tóktust ógvuliga uppsetttir uppá, at meistaraheitið skuldi tryggjast móti kollfirðingum, sum hinvegin tóktust eitt sindur óttafullir um uppgávuna.

Kollfirðingar valdu at verja rættuliga offensivt, sum teir eru vanir, og millum annað vardu teir rættuliga frammalaga á bæði Sámali á bakkinum og á Daniel Rapa á miðjuni. Hetta hevði við sær, at tað gjørdist rættuliga opið aftan fyri verjuna, og hetta dugdu vestmenningar væl at gera sær dælt av.

Vengurnir hjá VÍF trektu nevnliga ofta inn á strikuna, og harvið drógu teir verjuna hjá kollfirðingum saman, og hetta gav sera gott pláss hjá VÍF at fara ígjøgnum úti í síðunum.

Tað hevur verið eitt eyðkenni hjá KÍF í ár, at teir hava valt eina rættuliga offensiva verju, sum teir vóna kann oyðileggja rútmuna í álopsspælinum hjá mótpartinum. Hetta hevur eydnast teimum mangan, men leygardagin gav hetta einki úrslit, tí vestmenningar høvdu ongar trupulleikar av at spæla móti offensivu verjuni, og tað er kanska enn eitt dømi um, hví VÍF er besta liðið í landinum.

### Eli er nakað serligt

Tá lá rættuliga væl fyri í álopspartinum hjá vestmenningum, og serliga ein maður sum Áki G. Olsen hevði ein góðan. Ikki einans fekk hann fleiri góð mál, har hann at kalla bardi seg gjøgnum verjuna hjá kollfirðingum. Áki átti eisini heilt ofta næstseinastu hondina á bóltinum, áðrenn hann sat í netinum.

Í hinum endanum mundi verjan hjá vestmenningum spæla ein tann besta dystin hjá sær í alt ár, og tað sum verjan ikki fekk fatur á, tað tók ein serstakliga væl upplagdur Eli Müller sær av.

Eli hevur, síðani hann kom aftur eftir skaða, ivaleyst verið besti maður hjá vestmenningum. Í fleiri dystum hevur hann næstan einsamallur maður tikið mótið frá mótstøðuliðunum, og leygardagin var einki undantak í so máta. Tað var næstan líka mikið, hvat kollfirðingar royndu seg við, so tók Eli sær av tí. Framúrskarandi málmansspælið hjá Eli Müller hevði við sær, at álopsspælið hjá KÍF gjørdist ógvuliga stirvið og fjáltursstungið, og menn vóru trekir við at royna seg.

VÍF bygdi sær tískil so við og við eina rættuliga trygga leiðslu, og tað gekk heldur ikki long tíð, so var dysturin og harvið føroyameistaraheitið avgjørt.

### Bólttap í hópatali

VÍF-maskinan koyrdi sum í gomlum døgum, og neyðars Óla Kristian í málinum hjá kollfirðingum bleiv ferð aftan á ferð svikin av verjuni hjá sær. Tað var heldur ikki so, at kollfirðingarnir kundu steðga VÍF við at taka ein mann burtur úr, tí vestmenningar hava so nógvar streingir at spæla uppá, so tað ger ikki nakran serligan mun.

Tá ið so kollfirðingar sjálvir høvdu bóltin, var tað heilt ófatuligt at síggja, hvussu ofta teir púra óneyðugt tveittu bóltin út av vøllinum, uttan at teir yvirhøvur vóru trýstir av mótstøðumonnunum.

Tað var týðuligt, at tað gjørdist bara truplari og truplari hjá KÍF at fylgja